STARVSLÝSINGAR



## Kundaráðgevar til Vinnulívsdeildina

Vit sóknast eftir kundaráðgevum til vinnulívsdeildina í Havn. Arbeiðsuppgávurnar eru spennandi og fjølbroyttar og fevna um alt samskiftið við vinnulívskundarnar. Arbeiðið á vinnulívsdeildini er skipað í toymi, og tey, ið verða sett, fara at arbeiða í tøttum samstarvi við hinar kundaráðgevarnar á deildini.

Vit leita eftir starvsfelagum, ið dáma væl at hava tætt samband við viðskiftafólk. Vit ynska at veita kundum okkara ta bestu ráðgevingina og tænastuna. Tí mugu evnini at samstarva, samskifta og virka í einum umhvørvi, sum støðugt broytist, vera góð.

Umsøkjarar skulu hava førleika í roknskapargreining og hava viðkomandi útbúgving, eitt nú peningastovnsútbúgving við Finansiel Videreuddannelse ella aðra búskaparliga útbúgving.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Gunnar Streymoy, vinnulívsleiðara, á tel. 348630 ella á e-mail gunnar.streymoy@sparikassin.fo ella við Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðara, á tel. 348510 ella á e-mail marjun.eystberg@sparikassin.fo.

Starvið verður sett skjótast gjørligt. Lønin verður ásett eftir avtalu.

Skrivligar umsóknir skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi týsdagin tann 21. februar 2006.

Send umsóknina til:

FØROYA SPARIKASSI
Starvsfólkadeildin
Att.: Marjun Eystberg
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

## HR-mennari til Starvsfólkadeildina

Vit sóknast eftir einum HR-mennara til starvsfólkadeildina. Arbeiðsuppgávurnar eru spennandi og fjølbroyttar og fevna um coaching og sparring við starvsfólk, deildarleiðarar og leiðslu. Samskipan av útbúgving í Sparikassanum er eisini ein partur av starvinum.

Í Sparikassanum verður stórur dentur lagdur á fakliga og persónliga menning og at arbeiðsumstøðurnar eru so góðar sum gjørligt. Starvsfólkini eru týdningarmesta tilfeingið hjá Sparikassanum og tað er uppgávan hjá HR-mennaranum at tryggja at tilfeingið verður nýtt á skilabestan hátt.

Vit ynskja okkum ein starvsfelaga, ið hevur hug og evni at arbeiða við menniskjum og dugur at samskifta á ein jaligan hátt.

Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving og førleika innan human ressource.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðara, á tel. 348510 ella á e-mail marjun.eystberg@sparikassin.fo.

Starvið verður sett skjótast gjørligt. Lønin verður ásett eftir avtalu.

Skrivligar umsóknir skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi týsdagin tann 21. februar 2006.

Send umsóknina til:

FØROYA SPARIKASSI
Starvsfólkadeildin
Att.: Marjun Eystberg
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 211 fólk á 2 vinnulívsdeildum og 16 privatkundadeildum kring um í landinum. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Á vinnulívsdeildini í Havn starvast 10 fólk og á starvsfólkadeildini starvast 3 fólk. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið INNI og Eik Bank.

FØROYA SPARIKASSI


Havnar Bio

kall Coca-Cola



**The Fog** FRUMSÝNING

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag 17.02 | kl. 23.30 | |
| Leygardag 18.02 | kl. 23.30 | |
| Sunnudag 19.02 | kl. 22.00 | |




**Fun with Dick & Jane**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag 17.02 | kl. 19.00 | kl. 21.15 |
| Leygardag 18.02 | kl. 19.00 | kl. 21.15 |
| Sunnudag 19.02 | kl. 19.30 | |



**Lille Kylling**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag 17.02 | kl. 17.00 | |
| Leygardag 18.02 | kl. 17.00 | |
| Sunnudag 19.02 | kl. 17.30 | |




**Afsporet**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag 17.02 | kl. 20.15 | |
| Leygardag 18.02 | kl. 20.15 | |
| Sunnudag 19.02 | kl. 19.15 | |




**München**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag 17.02 | kl. 22.30 | |
| Leygardag 18.02 | kl. 22.30 | |
| Sunnudag 19.02 | kl. 21.30 | |




**Nanny McPhee**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag 17.02 | kl. 18.00 | |
| Leygardag 18.02 | kl. 18.00 | |
| Sunnudag 19.02 | kl. 17.00 | |

www.bio.fo • Telefon 31 19 56
Stórt úrval av DVD-filmum til sølu